Almanna- og bústaðamálaráðið

Dagfesting: 29.04.2026
Mál nr.: 26/00962
Málsviðgjørt: JAK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	Broyting í almannalógini
§ 21. ... *Stk. 2-3.* ... *Stk. 4.* Veiting sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., veiting sambært løgtingslóg um familjuískoyti og stuðul frá privatum hjálparfelagsskapum verður ikki tikin við sum inntøka sambært stk. 1.	**§ 15.** Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur (Almannalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022, § 6 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, løgtingslóg nr. 154 frá 19. desember 2023, løgtingslóg nr. 45 frá 27. mars 2025 og løgtingslóg nr. 180 frá 20. november 2025, verður í § 21, stk. 4, aftan á "familjuískoyti" sett: ", leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul".

§ 12. ... *Stk. 2-5.* ... *Stk. 6.* Inntøkur frá arbeiði, aðrar inntøkur, vinningur ella møguligur annar stuðul til uppihald í fyriskipanartíðarskeiðnum verða mótroknað í stuðulsveitingini. *Stk. 7-10.* ...	*Broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk* **§ 16.** Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður í § 12, stk. 6 aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul verður ikki mótroknaður í stuðulsveitingini."
§ 7. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Aðrar inntøkur, vinningur ella møguligur annar stuðul verður lagt afturat inntøkuni. Barnaviðbót/barnagjald, serligt barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar, viðbót til ávísar pensjónistar, røktarviðbót, hjálparviðbót, avlamisviðbót, avlamisveiting og endurgjald fyri varandi mein og ikki-fíggjarligan skaða verður ikki tikið við sum inntøka. *Stk. 4-6.* ...	*Broyting í løgtingslóg um familjuískoyti* **§ 17.** Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022, løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023 og løgtingslóg nr. 162 frá 20. desember 2023, verður í § 7, stk. 3, 2. pkt. aftan á "avlamisveiting" sett: ", leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul".
§ 29. ... 1)-12) ... 13) a) Grundupphædd av fólkapensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 1, grundupphædd av fyritíðarpensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 2-4, avlamisviðbót eftir § 2, stk. 3, eyka viðbót eftir § 2, stk. 4, avlamisveiting eftir § 8 a, barnaviðbót eftir § 10, hjálparviðbót og røktarviðbót eftir § 11, persónlig viðbót eftir § 12 og aldursviðbót eftir § 45 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. b) Veitingar eftir løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.	*Broyting í skattalógini* **§ 18.** Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, løgtingslóg nr. 39 frá 16. mai 2024, løgtingslóg nr. 145 frá 20. desember 2024 og løgtingslóg nr. 75 frá 30. apríl 2025, verður í § 29, nr. 13 sum litra g sett: "g) Leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul."

c) Veitingar eftir §§ 15-19, § 24 og §§ 26-30 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. d) Veitingar eftir § 7, § 12, stk. 3, 4 og 9 og § 19 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. e) Barnagjald, hækkað barnagjald og onnur serlig gjøld eftir lóg um rættarstøðu barnanna uttan mun til, um tey verða goldin av gjaldskylduga ella sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.a. f) Veitingar eftir løgtingslóg um familjuískoyti. 14)-31). ...	